LM-084/2025

# Almanna- og heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 18.02.2026 |
| Mál nr.: | 24/29005 |
| Málsviðgjørt: | JAK |
| Ummælistíð: | 21.11.2025-<br>19.12.2025 |
| Eftirkannað: | 19.01.2026 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar**

*Virkisøki*

**§ 1.** Henda løgtingslóg fevnir um persónar, ið hava fingið fyribils uppihaldsloyvi sambært anordning nr. 433 af 8. april 2022 om ikrafttræden for Færøerne af lov om midlertidig opholdstilladelse til personer, der er fordrevet fra Ukraine.

*Bráðfeingis bústaðir*

**§ 2.** Bráðfeingis bústaðir eftir hesi løgtingslóg eru felags bústaðir til persónar, sum koma undir § 1, og sum ikki hava annan hóskandi bústað.

**§ 3.** Landsverk hevur heimild at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir. Landsverk hevur harafturat heimild at útvega grundleggjandi innbúgv og at seta í stand, umbyggja og halda við líka bústaðirnar.

**§ 4.** Landsverk er útleigari og umsitur bráðfeingis bústaðirnar, sbr. tó §§ 8 og 9.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið í samferðslumálum kann gera eitt standard leiguskjal og áseta skilhaldsreglur fyri bústaðirnar.

**§ 5.** Bráðfeingis bústaðirnir eru ikki fevndir av leigulógini.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið í samferðslumálum kann áseta serstakar leigureglur fyri bústaðirnar.

**§ 6.** Persónur í bráðfeingis bústaði skal rinda landinum fyri húsaleigu.
*Stk. 2.* Landsverk ásetur húsaleiguna í samráð við landsstýrisfólkið í samferðslumálum.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið í samferðslumálum kann áseta reglur um innkrevjing av húsaleigu.

**§ 7.** Samlaðu leiguinntøkurnar frá bráðfeingis bústøðunum kunnu vera lægri enn útreiðslurnar hjá landinum at útvega, umsita og reka bústaðirnar.

**§ 8.** Almannaverkið ávísir persónar í bráðfeingis bústaðirnar.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið í almannamálum kann áseta nærri reglur um treytirnar fyri ávísing.

**§ 9.** Persónur í einum bráðfeingis bústaði hevur skyldu at flyta í annan bráðfeingis bústað, um Almannaverkið krevur tað.
*Stk. 2.* Almannaverkið kann krevja, at ein persónur tekur av einum tilboði um annan hóskandi bústað. Tekur viðkomandi ikki av einum tilboði um annan hóskandi bústað, skal Landsverk, eftir áheitan frá Almannaverkinum, uppsiga leigumálið í bráðfeingis bústaðnum.

*Sosialur samskipari*

**§ 10.** Almannaverkið hevur ábyrgdina og kann seta starvsfólk at virka sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum. Almannaverkið kann eisini gera avtalu við ein uttanhýsis part um at røkja uppgávuna sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum. Uppgávan hjá sosiala samskiparanum er at veita teimum búgvandi sosialfakliga ráðgeving, stuðul og hjálp.

*Serreglur á almannaøkinum*

**§ 11.** Fyri persónar, ið eru fevndir av § 1, kann landsstýrisfólkið í almannamálum:
1) áseta reglur um, at víkjast skal frá kravinum um danskan heimarætt sambært § 3, stk. 2, nr. 1 í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.
2) áseta reglur um, at treytin um varandi uppihaldsloyvi í § 2, stk. 2 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk í nærri tilskilaðan mun ikki er galdandi fyri virknisvenjing, stuðul til arbeiðsbúgving og leiðbeinaraskipan sambært kapitlum 3, 4 og 8 í løgtingslógini.
3) áseta reglur, sum víkja frá § 12, stk. 1 í almannalógini um, at sambúgvandi persónar fáa lægri uppihaldsveiting enn persónar, sum búgva einsamallir, og seta serligar treytir fyri uppihaldsveiting.

*Serligar útreiðslur*

**§ 12.** Almannaverkið kann halda serligar útreiðslur, ið eru tongdar at persónum, ið koma undir § 1.

*Gildiskoma og gildistíð*

**§ 13.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi tann 1. januar 2028.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

*Bráðfeingis bústaðir*

Á vári 2025 stóðu nógvir burturriknir ukrainar[1] brádliga og eitt sindur óvæntað til at missa sín bústað í Føroyum.

Flestu av hesum høvdu búð í stutttíðarleigumálum, sum vár- og summarhálvuna skuldu leigast út í ferðavinnuhøpi, meðan onnur máttu flyta út, tí bústaðurin skuldi seljast ella nýtast til annað endamál, ella tí tey ikki longur høvdu ráð at rinda húsaleiguna.

Fyri at tryggja, at fólk ikki endaðu úti á gøtuni, var neyðugt at seta bráðfeingis skipanir í verk beinanvegin.

Landsverk, sum fekk uppgávuna at útvega bráðfeingis bústaðir til hendan persónsbólkin, umframt uppgávuna at umsita og reka bústaðirnar, bar skjótt at og gjørdi avtalu við stýrið fyri Føroya Barnaheim um at leiga gamla Barnaheimið í Pedda við Stein Gøtu í Havn. Í góðum samstarvi við m.a. Útlendingastovuna og Almannaverkið eydnaðist tað tískil at útvega øllum ukrainunum ein bráðfeingis bústað, áðrenn nakar teirra gjørdist heimleysur.

Á sumri 2025, tá tørvurin á bráðfeingis bústøðum var størst, búðu tað 25 ukrainar á Barnaheiminum. Út á veturin, tá høvuðsártíðin hjá ferðavinnuni var endað, minkaði talið niður á 10, men síðst í desember og fyrst í januar 2026 fluttu trý húski inn, og í løtuni búgva tað sostatt 17 burturriknir ukrainar á Barnaheiminum. Alt bendir á, at tørvurin á bráðfeingis bústøðum fer at veksa aftur, tá summarið nærkast, og neyðugt er tí at fáa greiðari heimildir og meira skipaðar karmar rundanum bústaðirnar.

Lógaruppskotið leggur upp til eitt samstarv og ábyrgdarbýti millum Landsverk og Almannaverkið, har Landsverk fær uppgávuna at útvega, umsita og reka bráðfeingis bústaðirnar, meðan Almannaverkið skal standa fyri ávísingini (visitatión) og harafturat skal veita sosialfakliga ráðgeving og stuðul í bústøðunum.

Við lógaruppskotinum fær Landsverk eina greiða heimild at útvega hølir til bráðfeingis bústaðir og at gera bústaðirnar klárar og halda teir við líka. Landsverk fær eisini heimild at áseta serstakar leigureglur og skilhaldsreglur fyri leigumálini.

Almannaverkið fær heimild at seta ein sosialan samskipara, sum burturav skal taka sær av at hjálpa persónunum í bráðfeingis bústøðunum, ella at gera avtalu við ein uttanhýsis part um at veita somu tænastu, ella part av somu tænastu, vegna Almannaverkið.

Bráðfeingis bústaðirnir verða skipaðir sum felags bústaðir – sum eitt slag av búfelagsskapi – har einstaklingar og familjur, í tann mun tað ber til, fáa hvør sítt kamar/kømur, men har tey mugu deila køk, ves og onnur felagshølir saman við øðrum í bráðfeingis bústøðunum.

[1] Burturriknir ukrainar eru persónar, ið hava fingið fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum sambært anordning nr. 433 af 8. april 2022 om ikrafttræden for Færøerne af lov om midlertidig opholdstilladelse til personer, der er fordrevet fra Ukraine.

*Heimild at áseta serreglur á almannaøkinum*

Burturriknu ukrainarnir eru í dag ikki fevndir av løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, tí uppihaldsloyvini hjá teimum eru tíðaravmarkað. Almannaverkið hevur av somu orsøk avmarkaðar møguleikar at arbeiða aktivt við at fáa ukrainarnar út á føroyska arbeiðsmarknaðin og at varðveita teir á arbeiðsmarknaðinum – eitt nú gjøgnum virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinaraskipanina.

Fyri at fáa eitt stað at búgva í, hava ukrainarnir í fleiri førum verið noyddir at flyta í ein bústað saman við øðrum ukrainum, sum teir ikki frammanundan hava nakra relatión til, ella flyta í ein bústað saman við øðrum órelateraðum persónum. Tá teir eru fluttir inn, hava ukrainarnir fingið støðu sum *sambúgvandi* sambært § 12, stk. 1 í almannalógini. Harvið hava teir fingið eina lægri uppihaldsveiting, enn teir høvdu rætt til áðrenn. Hetta hóast ukrainarnir í flestu førum ikki eru *samlivandi*, men liva hvør sítt lív í sama bústaði og ikki eru felags um aðrar útreiðslur enn húsaleiguna og útreiðslurnar til streym og olju.

Tað er komið fyri, at ukrainar hava verið noyddir at siga bústaðin frá sær aftur, tí teir við lægru uppihaldsveitingini ikki longur hava havt ráð til hann.

Harafturat eru nakrir av burturriknu ukrainunum einsamallir uppihaldarar at børnum, men hava ikki rætt til barnaískoyti sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl. Orsøkin er, at § 2, stk. 2 í løgtingslógini setur krav um varandi uppihaldsloyvi, meðan uppihaldsloyvini hjá ukrainunum eru tíðaravmarkað.

Samanumtikið má staðfestast, at burturriknu ukrainarnir í dag ikki hava nøktandi atgongd til ymiskar grundleggjandi almennar skipanir í Føroyum, og at ukrainarnir tí ikki hava nóg góðan møguleika at fóta sær í landinum.

Fyri at loysa trupulleikan er neyðugt at víkja frá ymiskum treytum – og í ávísan mun áseta serreglur – á almannaøkinum.

Neyðugt er at geva landsstýrisfólkinum heimild at víkja frá treytini um danskan heimarætt sambært § 3, stk. 2, nr. 1 í løgtingslóg um barnagjald, soleiðis at ukrainarnir kunnu fáa barnagjald á jøvnum føti við føroyingar.

Eisini er neyðugt at geva landsstýrisfólkinum heimild at áseta serreglur um uppihaldsveiting til burturriknar ukrainar, sum víkja frá § 12, stk. 1 í almannalógini, soleiðis at ukrainarnir ikki automatiskt fáa eina lægri uppihaldsveiting, tá teir flyta inn í ein bústað saman við órelateraðum persónum. Samstundis skal tað eisini vera møguligt hjá landsstýrisfólkinum at seta serligar treytir fyri uppihaldsveiting til burturriknar ukrainar, eitt nú viðvíkjandi málundirvísing. Har lóggávan í dag hevur víst seg at seta avmarkingar fyri, hvussu nógva málundirvísing ukrainarnir kunnu fáa, áðrenn teir missa rættin til uppihaldsveitingina, skal landsstýrisfólkið í almannamálum frameftir hava møguleika at kunna seta sum treyt fyri uppihaldsveiting, at ukrainarnir læra seg so mikið av føroyskum ella enskum, at teir kunnu virka á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Harafturat er neyðugt at geva landsstýrisfólkinum heimild til – í nærri tilskilaðan mun – at víkja frá kravinum um varandi uppihaldsloyvi sambært § 2, stk. 2 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, so Almannaverkið fær møguleika at bjóða burturriknu ukrainunum tilboð um virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinara sambært kapitlum 3, 4 og 8 í løgtingslógini.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Eingin føroyskur myndugleiki hevur í løtuni nakra lógarásetta ábyrgd – ella nakra beinleiðis heimild – at veita burturriknu ukrainunum ein bráðfeingis bústað.

Burturriknir ukrainar hava í dag rætt til fyribils uppihaldsveiting, men um teir flyta í ein bústað saman við øðrum órelateraðum persónum, fáa teir støðu sum sambúgvandi sambært § 12, stk. 1 í almannalógini og fáa harvið eina lægri uppihaldsveiting, enn teir annars høvdu fingið.

Burturriknu ukrainarnir eru ikki fevndir av løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl. og hava tí ikki rætt til barnaískoyti eftir løgtingslógini.

Burturriknu ukrainarnir eru í dag heldur ikki fevndir av løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og Almannaverkið hevur tí avmarkaðar møguleikar at arbeiða aktivt við at fáa persónarnar út á føroyska arbeiðsmarknaðin, og at varðveita teir á arbeiðsmarknaðinum.

Almannalógin setur í dag avmarkingar fyri, hvussu nógva málundirvísing burturriknu ukrainarnir kunnu fáa uttan samstundis at missa rættin til uppihaldsveiting, tí rætturin til uppihaldsveiting er treytaður av, at persónurin er tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Fyllir undirvísingin so nógv, at persónurin treyðugt fær røkt eitt starv við síðuna av, verður hann av Almannaverkinum ikki mettur at vera tøkur fyri arbeiðsmarknaðin.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva Landsverki eina greiða heimild at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir til burturriknar ukrainar, sum ikki hava nakran annan bústað. Endamálið er harafturat at áseta yvirskipaðu karmarnar rundanum bráðfeingis bústaðirnar.

Endamálið er eisini at geva Almannaverkinum ábyrgd og heimild at seta ein sosialan samskipara, sum burturav skal taka sær av at veita persónunum í bráðfeingis bústøðunum sosialfakliga ráðgeving, stuðul og hjálp, ella at gera avtalu við ein uttanhýsis part um at veita hesar tænasturnar, ella part av hesum tænastunum, vegna Almannaverkið.

Endamálið við lógaruppskotinum er harafturat at geva landsstýrisfólkinum í almannamálum heimild at víkja frá ymiskum treytum, og í nærri tilskilaðan mun áseta serreglur, á almannaøkinum fyri burturriknu ukrainarnar, soleiðis at ukrainarnir ikki detta niðurímillum grundleggjandi almennar skipanir, og soleiðis at Almannaverkið fær betri amboð at hjálpa ukrainunum út á føroyska arbeiðsmarknaðin, og at varðveita teir á arbeiðsmarknaðinum.

Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja, at burturriknu ukrainarnir hava møguleika at fóta sær, so leingi teir eru í Føroyum.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Landsverk fær við lógaruppskotinum greiða heimild at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir til burturriknar ukrainar, sum ikki hava annan hóskandi bústað, og at gera bústaðirnar klárar og halda teir við líka.

Landsverk fær við uppskotinum eisini heimild at áseta serstakar leigureglur og skilhaldsreglur fyri leigumálini.

Bráðfeingis bústaðirnir verða skipaðir sum felags bústaðir – sum eitt slag av búfelagsskapi – har einstaklingar og familjur, í tann mun tað ber til, fáa hvør sítt kamar/kømur, men mugu deila køk, ves og onnur felagshølir saman við øðrum persónum í bráðfeingis bústøðunum.

Almannaverkið fær við uppskotinum heimild at seta ein sosialan samskipara, sum burturav skal taka sær av at hjálpa persónunum í bráðfeingis bústøðunum, ella at gera avtalu við ein uttanhýsis part um at veita hesa tænastuna, ella part av hesi tænastu, vegna Almannaverkið.

Uppskotið heimilar harafturat landsstýrisfólkinum í almannamálum at víkja frá treytini um danskan heimarætt í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl. og í nærri tilskilaðan mun víkja frá treytini um varandi uppihaldsloyvi í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Eisini fær landsstýrisfólkið heimild til at víkja frá regluni í § 12, stk. 1 í almannalógini um, at sambúgvandi fáa eina lægri uppihaldsveiting enn persónar, sum búgva einsamallir.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri í tíðarskeiðinum 21. november til 19. desember 2025.

Lógaruppskotið varð harafturat sent beinleiðis til hesar partar:

- Almannaverkið
- Reyða Kross
- Útlendingastovuna
- Løgmálaráðið
- Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
- Landsverk
- Kommunufelagið
- Tórshavnar kommunu
- Sosialráðgevarafelagið
- Stýrið fyri Føroya Barnaheim

Almannaverkið, Reyði Krossur, Útlendingastovan, Kommunufelagið, Landsverk og stýrið fyri Føroya Barnaheim hava sent Almanna- og heilsumálaráðnum viðmerkingar til lógaruppskotið.

Ummælini verða viðgjørd niðanfyri:

**Almannaverkið** vísir í ummælinum á, at tað er ov ógreitt, at Almannaverkið og Landsverk, sambært uppskotinum til § 9, hvør sær kunnu krevja, at ein persónur skal flyta í ein annan bústað. Almannaverkið mælir til, at tað einans verður Almannaverkið, ið kann krevja hetta, tí Almannaverkið hevur sambært uppskotinum til § 8 uppgávuna at ávísa persónar í bráðfeingis bústaðirnar.

**Almanna- og heilsumálaráðið** hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar og hevur broytt lógaruppskotið, soleiðis at tað nú bara er Almannaverkið, ið kann krevja, at ein persónur skal flyta í ein annan bráðfeingis bústað. Á sama hátt er tað nú bara Almannaverkið, ið kann taka stig til, at leigumálið í bráðfeingis bústaðnum verður uppsagt, um ein persónur noktar at flyta í ein annan, hóskandi bústað.

**Almannaverkið** mælir í ummælinum eisini til, at viðmerkingarnar til lógaruppskotið verða broyttar, soleiðis at viðmerkingarnar ikki leggja upp til, at Almannaverkið skal gera avtalu við Reyða Kross um sosiala samskiparan sambært § 10. Almannaverkið metir nevniliga, at viðmerkingarnar um hetta kunnu skiljast sum ein bundin áheitan á Almannaverkið.

**Almanna- og heilsumálaráðið** skal í hesum sambandi vísa á, at sambært uppskotinum til § 10 er tað upp til Almannaverkið at gera av, um Almannaverkið sjálvt skal taka sær av uppgávuni sum sosialur samskipari, ella um uppgávan skal leggjast til ein uttanhýsis part. Verður uppgávan løgd til ein uttanhýsis part, stendur tað Almannaverkinum frítt at gera av, hvør hesin uttanhýsis parturin skal vera. Almanna- og heilsumálaráðið hevur tí strikað allar viðmerkingar í lógaruppskotinum um, at Almannaverkið væntandi fer at gera avtalu við Reyða Kross um framhaldandi at taka sær av uppgávuni sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum.

**Almannaverkið** mælir harafturat til, at § 11, nr. 2 í lógaruppskotinum um, at landsstýrisfólkið kann áseta serligar reglur fyri burturriknar ukrainar viðvíkjandi virknisvenjing og arbeiðsbúgving sambært kapitlum 3 og 4 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, eisini fer at vísa til kapittul 8 í løgtingslógini um leiðbeinaraskipan. Ein leiðbeinari kann játtast til ein persón, ið er í vanda fyri at missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, uttan at hesir persónar annars eru fevndir av nøkrum arbeiðsfremjandi tiltaki.

**Almanna- og heilsumálaráðið** hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og § 11, nr. 2 í lógaruppskotinum vísir nú eisini til kapittul 8 um leiðbeinaraskipan í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

**Almannaverkið** hevur harafturat víst á, at ein tilvísing í viðmerkingunum til lógaruppskotið, til eina lógaráseting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, er skeiv.

**Almanna- og heilsumálaráðið** hevur rættað skeivu tilvísingina.

**Reyði Krossur** fegnast í ummælinum um, at landsstýrisfólkið nú fær heimild at áseta serreglur á almannaøkinum. Reyði Krossur metir, at serreglurnar kunnu stuðla undir møguleikan hjá burturriknu ukrainunum at fóta sær í føroyska samfelagnum og á føroyska arbeiðsmarknaðinum og bústaðamarknaðinum.

**Reyði Krossur** vísir í ummælinum á, at tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur skrivað, at tað er neyðugt at víkja frá meginregluni um lægri uppihaldsveiting fyri sambúgvandi, tá burturriknir ukrainar flyta inn í ein bústað saman við øðrum burturriknum ukrainum. Reyði Krossur ger vart við, at tað eisini er neyðugt at víkja frá meginregluni um lægri uppihaldsveiting, tá burturriknir ukrainar flyta inn í ein bústað saman við øðrum órelateraðum persónum enn burturriknum ukrainum.

**Almanna- og heilsumálaráðið** hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar og hevur tillagað viðmerkingarnar til lógaruppskotið.

**Reyði Krossur** vísir í ummælinum eisini á, at tað higartil ikki hevur verið nóg greitt, um Almannaverkið ella Reyði Krossur (sum sosialur samskipari) hevur endaligu ábyrgdina av avgerðum um, hvørji fólk flyta inn í bráðfeingis bústaðirnar, og nær fólk ikki longur kunnu verða búgvandi. Reyði Krossur vísir á, at tað er sera týdningarmikið, at hetta ábyrgdarbýtið verður greitt staðfest í lógaruppskotinum.

**Almanna- og Heilsumálaráðið** skal í hesum sambandi vísa á, at §§ 8-9 í løgtingslógaruppskotinum staðfesta greitt, at Almannaverkið fer at ávísa persónar í bráðfeingis bústaðirnar, eins og tað verður Almannaverkið, ið fer at kunna krevja, at persónar skulu taka av einum tilboði um annan hóskandi bústað.

**Reyði Krossur** setur í ummælinum harafturat spurning við ásetingina í § 5, 1. pkt. um, at leigulógin ikki verður galdandi fyri bráðfeingis bústaðirnar. Reyði Krossur vísir á, at tað hevur týdning, at hesir burturriknu ukrainarnir ikki verða verri settir enn aðrir leigarar á leigubústaðamarknaðinum. Reyði Krossur vísir á, at uppsagnarfreistin frá Landsverki/Almannaverkinum má vera rímilig, og at búfólkini ikki mugu sigast úr bráðfeingis bústaðnum frá degi til dag.

**Almanna- og heilsumálaráðið** skal í hesum sambandi vísa á, at orsøkin til, bráðfeingis bústaðirnir ikki fara at vera fevndir av leigulógini, er, at talan er ikki um vanligar leigubústaðir, men um eitt bráðfeingis tilboð. Fyri at fáa bráðfeingis skipanina at virka má Almannaverkið hava møguleika at flyta fólk úr einum bráðfeingis bústaði í ein annan við rættiliga stuttum skotbrái, tá tað er neyðugt fyri at fáa samansetingina av persónum at ganga upp. Talan kann t.d. vera um flyta ein persón frá einari adressu til eina aðra adressu, ella úr einum stórum kamari í eitt minni kamar, soleiðis at tað verður pláss hjá einari familju at búgva samlað. Persónar í bráðfeingis bústøðum fara tí ikki at hava somu rættindi sum persónar, sum búgva í einum vanligum leigumáli, fevnt av leigulógini, men talan er sum áður nevnt ikki um vanlig leigumál.

**Reyði Krossur** vísir at enda á, at treytirnar fyri ávísing í bráðfeingis bústaðirnar mugu taka hædd fyri teimum sera ymisku og ofta torgreiddu støðunum hjá burturriknu ukrainunum.

**Almanna- og heilsumálaráðið** skal í hesum sambandi viðmerkja, at § 8 í lógaruppskotinum heimilar landsstýrisfólkinum í almannamálum at áseta nærri reglur um treytirnar fyri ávísing. Verða nærri reglur ásettar, fara tær sjálvsagt at taka hædd fyri, at støðurnar hjá burturriknu ukrainunum kunnu vera sera ymiskar. At tað kunnu vera ymiskar og samansettar orsakir til, at persónarnir hava tørv á einum bráðfeingis bústaði.

**Stýrið fyri Føroya Barnaheim** hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið sum so, men boðar í ummælinum frá, at um Føroya landsstýri ynskir at halda fram við at leiga part av Barnaheiminum til bráðfeingis bústaðir til burturriknu ukrainarnar, eru stýrið fyri Føroya Barnaheim og Kirkjuliga Heimamissiónin sinnað at leingja leigumálið.

**Útlendingastovan** tekur undir við og fegnast um lógaruppskotið. Útlendingastovan hevur tó ta viðmerking, at hugtakið, “varandi bústaður”, eigur at verða nærri skilgreinað í lógaruppskotinum, soleiðis at tann, ið skal stuðla ukrainunum at finna nýggjan bústað, hevur greiðar reglur at halda seg til.

**Almanna- og heilsumálaráðið** hevur tikið viðmerkingina frá Útlendingastovuni til eftirtektar og hevur rættað serligu viðmerkingar til § 9, stk. 2. Serligu viðmerkingarnar til ásetingina gera nú greitt, at leigumál styttri enn 3 mánaðir ikki eru at meta sum “hóskandi bústaður”. Um ein persónur/familja í einum bráðfeingis bústaði fær tilboð um ein annan bústað, men ikki kann rokna við at búgva í hesum bústaðnum longur enn 3 mánaðir, fer viðkomandi við lógaruppskotinum sostatt ikki at hava skyldu at taka av tilboðnum.

**Landsverk** vísir í ummælinum á, at samstarvið við Reyða Kross, sum higartil hevur tikið sær av uppgávuni sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum, hevur týdning fyri eitt nú dagliga samskiftið um samanseting av búfólkum í búeindunum, fyri praktisk viðurskifti í búfelagsskapinum, fyri ráðgeving, og fyri at finna persónunum egnan bústað.

Viðmerkingarnar hjá **Kommunufelagnum** fyrihalda seg ikki til sjálvt lógaruppskotið. Tær verða tí ikki nærri viðgjørdar her.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

**Fyri Landsverk**

Landsverk hevur gjørt avtalu við stýrið fyri Føroya Barnaheim um at leiga ein part av Barnaheiminum til bráðfeingis bústaðir. Kostnaðurin fyri at leiga Barnaheimið er 40.625 kr. um mánaðin, t.e. 487.500 kr. um árið.

Burturriknu ukrainarnir rinda Landsverki húsaleigu fyri at búgva í bráðfeingis bústøðunum. Fram til 27. januar 2026 hevur Landsverk havt 226 tús. kr. í leiguinntøkum frá bráðfeingis bústøðunum.

Aftrat leigugjaldinum fyri Barnaheimið hevur Landsverk útreiðslur í sambandi við:

- raksturin av bygninginum,
- at gera smærri ábøtur á bygningin eftir tørvi,
- umsitingina av bráðfeingis bústøðunum, harímillum at gera leigusáttmálar og krevja húsaleigu inn, og
- húsavarðartænastu.

Á fíggjarlógini fyri 2026 hevur Landsverk fingið játtað 530 tús. kr. fyri at taka sær av teimum uppgávum, sum lógaruppskotið leggur til Landsverk. Harafturat fær Landsverk leiguinntøkurnar frá bráðfeingis bústøðunum, sum kunnu roknast við at verða uml. 430 tús. kr. árliga.

**Fyri Almannaverkið**

Í lógaruppskotinum verður skotið upp, at Almannaverkið skal seta ein sosialan samskipara at veita sosialfakliga ráðgeving, stuðul og hjálp til persónarnar í bráðfeingis bústøðunum.

Ítøkiliga fevna uppgávurnar hjá samskiparanum m.a. um:

- at taka ímóti fólki, tá tey flyta inn,
- at gera mannagongdir fyri húsið og arbeiðið hjá samskiparanum,
- at vera til staðar fyri tey búgvandi nakrar tímar hvønn gerandisdag at svara spurningum og hjálpa teimum við dagligum avbjóðingum, og
- stuðla teimum búgvandi at finna ein varandi bústað.

Við lógaruppskotinum kann Almannaverkið, ístaðin fyri at seta ein sosialan samskipara, gera avtalu við ein uttanhýsis part um at veita hesar tænasturnar, ella part av hesum tænastunum, vegna Almannaverkið.

Higartil hevur Reyði Krossur, fyrst eftir avtalu við Løgmálaráðið og síðani Almannaverkið, tikið sær av uppgávuni sum sosialur samskipari. Avtalan hjá Almannaverkinum við Reyða Kross gongur út tann 1. mars 2026. Almannaverkið yvirtekur tá uppgávuna sum sosialur samskipari, men Almannaverkið og Reyði Krossur fara væntandi at halda fram við at samstarva um uppgávuna at útvega burturriknu ukrainunum ein varandi bústað.

Vísast skal harafturat á, at Almannaverkið hevur umsitið sosialviðurskiftini hjá burturriknu ukrainunum síðani 2022 – uttan at nøktandi játtan hevur fylgt við. Uppgávan hevur uppá allar mátar hevur verið krevjandi, starvsfólkaliga eins væl og umsitingarliga. At nøktandi játtan ikki hevur fylgt við, hevur havt við sær, at sosialráðgevar hjá Almannaverkinum í summum førum hava verið noyddir at tikið hesi málini framum onnur mál, sum av tí sama hava fingið eina longri viðgerðartíð. Sosialráðgevarnir hava í ávísan mun eisini verið noyddir at tikið sær av hesum uppgávunum aftrat vanligu starvsuppgávunum – sum eykaarbeiði.

Royndirnar hjá Almannaverkinum eru, at arbeiðið við burturriknu ukrainunum er munandi tyngri enn arbeiðið við føroyingum. Umframt at fólkini eru sosialt og fíggjarliga merkt av, at tey koma úr einum krígsherjaðum landi, koma tey til eitt land, sum í nógvar mátar er øðrvísi skipað enn heimlandið. Tey kenna ikki føroysku skipanirnar og stovnarnar, føroysku mentanina og málið (í nógvum førum heldur ikki enska málið), síni rættindi í Føroyum, og hvussu Føroyar í heila tikið eru skipaðar. Innanhýsis á Almannaverkinum eru nógvar umsóknir at avgreiða, eitt nú umsóknir um uppihaldsveiting, um íbúðarinnskot og um innskot til búseting (etablering), umsóknir um familjuískoyti og umsóknir um stuðul til stakútreiðslur. Fyrisitingarliga skal svar gevast skrivliga og helst á teirra máli ella á enskum. Støðan hjá burturriknu ukrainunum ger, at arbeiðið er meira torgreitt, krevur meira samskipan og í allar mátar er meira tíðarkrevjandi.

Almannaverkið hevur upplýst, at til tess at røkja verandi uppgávur á nøktandi hátt, umframt at arbeiða meira miðvíst við arbeiðsfremjandi tiltøkum, verður neyðugt at seta ein sosialráðgeva aftrat í starv.

Av tí, at arbeiðið við burturriknu ukrainunum er serliga sálarliga krevjandi fyri sosialráðgevarnar, hava sosialráðgevarnir, ið hava hesi málini um hendi, fingið serliga supervisión. Almannaverkið hevur eisini serligar útreiðslur til tulking í sambandi við hesi málini.

Á fíggjarlógini fyri 2026 eru játtaðar 1,35 mió. kr. til sosiala samskiparan í bráðfeingis bústøðunum, ein sosialráðgeva innanhýsis á Almannaverkinum, umframt til tulking og supervisión av sosialráðgevum.

*Møguligar lógarbundnar útreiðslur og sparingar*

Harafturat skal nevnast, at tað kunnu standast nýggjar lógarbundnar útreiðslur av, um heimildin í uppskotinum til § 11 verður nýtt til at áseta serreglur á almannaøkinum.

Eitt nú um tað verður ásett, at burturriknu ukrainarnir ikki skulu hava eina lægri uppihaldsveiting, hóast teir búgva saman við øðrum ukrainum og harvið eru sambúgvandi eftir galdandi reglum. Ella um tað verður ásett, at burturriknu ukrainarnir skulu hava rætt til barnaískoyti sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Av tí, at støða enn ikki er tikin til, um ella hvussu víkjast skal frá vanligu reglunum á almannaøkinum, ber tó illa til at siga nakað ítøkiligt um væntaðu útreiðslurnar. Tað ber tó til at taka eitt hugsað dømi fram:

Verður reglan um, at sambúgvandi fáa eina lægri uppihaldsveiting enn tey, sum ikki eru sambúgvandi, strikað fyri burturriknu ukrainarnar, fer ein persónur, 25 ár ella eldri, sum er sambúgvandi og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis einum barni, sum í dag fær 10.306,50 kr. í uppihaldsveiting, frameftir at fáa 15.459,75 kr. í uppihaldsveiting.

Verður dømið flutt yvir á 10 persónar, hevði tað kostað landinum 618 tús. kr. eyka í lógarbundnum útreiðslum um árið.

At enda skal nevnast, at burturriknir ukrainar bæði í 2024 og 2025 fingu fyribils uppihaldsveiting fyri tilsamans 10,3 mió. kr. Lógaruppskotið leggur upp til, at Almannaverkið skal kunna bjóða ukrainunum virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinara, sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, við tí endamáli at fáa fleiri teirra út á føroyska arbeiðsmarknaðin. Alt eftir, hvussu hetta eydnast, kann tað í framtíðini fara at hava við sær sparingar í lógarbundnu útreiðslunum til fyribils uppihaldsveiting til burturriknu ukrainarnar.

**Fyri kommunurnar**

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

## 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

**Fyri Landsverk og Almannaverkið**

Sí omanfyri undir pkt. 2.1.

**Fyri kommunurnar**

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

## 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar avleiðingar fyri vinnuna.

## 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

## 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

## 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur positivar avleiðingar fyri burturriknar ukrainar, sum hava mist ella standa til at missa bústaðin komandi tíðina, ella sum ikki hava nakran hóskandi bústað.

Lógaruppskotið hevur eisini positivar avleiðingar fyri burturriknu ukrainarnar sum heild, tí uppskotið ger tað møguligt at tillaga ymiskar almennar skipanir til hendan serliga bólkin av persónum.

## 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Eingir viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur týdning fyri skyldur Føroya sambært Evropeiska mannarættindasáttmálanum og ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ongar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Við lógaruppskotinum fær Landsverk heimild at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir til burturriknar ukrainar, sum ikki hava annan bústað. Persónar, sum leiga ein bráðfeingis bústað, skulu rinda landinum húsaleigu fyri leigu av bústaðinum, og Landsverk fær við uppskotinum heimild at áseta húsaleiguna í samráð við landsstýrisfólkið í samferðslumálum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum nakrar skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Við lógaruppskotinum fær Landsverk heimild at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir til burturriknar ukrainar, sum ikki hava annan bústað. Landsstýrisfólkið í samferðslumálum fær í hesum sambandi heimild at áseta serstakar leigureglur og skilhaldsreglur fyri bráðfeingis bústaðirnar.

Landsverk fær harafturat heimild at áseta húsaleiguna í samráð við landsstýrisfólkið í samferðslumálum, eins og landsstýrisfólkið í samferðslumálum fær heimild at áseta reglur um innkrevjing av húsaleiguni.

Almannaverkið fær við uppskotinum heimild at seta ein sosialan samskipara, ið burturav skal taka sær av at veita persónunum í bráðfeingis bústøðunum sosialfakliga ráðgeving, stuðul og hjálp, ella at gera avtalu við ein uttanhýsis part um at veita hesar tænasturnar, ella part av hesum tænastunum, vegna Almannaverkið.

Við uppskotinum fær landsstýrisfólkið í almannamálum heimild at áseta serreglur um barnaískoyti, uppihaldsveiting, virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinara, sum víkja frá

vanligu reglunum í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki nøkrum almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær omanfyri nevndu.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Uppskotið til *§ 1* ásetur virkisøkið, ella persónsbólkin, sum løgtingslógin verður galdandi fyri.

Løgtingslógin verður galdandi fyri persónar, sum hava uppihaldsloyvi sambært Anordning nr. 433 af 8. april 2022 om ikrafttræden for Færøerne af lov om midlertidig opholdstilladelse til personer, der er fordrevet fra Ukraine.

Við øðrum orðum verður løgtingslógin galdandi fyri burturriknar ukrainar við fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum.

**Til § 2**
Uppskotið til *§ 2* er ein skilmarking av hugtakinum, *bráðfeingis bústaðir*.

At bústaðurin er *bráðfeingis* merkir sum tað fyrsta, at talan er um ein fyribils bústað. Bráðfeingis bústaðirnir eru sostatt ikki ætlaðir sum varandi bústaðir hjá burturriknu ukrainunum. Málið er, at persónarnir skjótast gjørligt kunnu flyta aftur í egnan varandi bústað.

Uppskotið ásetur tó onga freist fyri, hvussu leingi persónarnir kunnu verða búgvandi, tí hetta valdast um møguleikarnar hjá teimum at flyta í annan hóskandi bústað, sbr. í hesum sambandi uppskotið til § 9 og serligu viðmerkingarnar til hesa greinina.

Løgtingslógin hongur sjálvsagt neyvt saman við støðuni í Ukraina. Endar kríggið, og burturriknu ukrainarnir kunnu flyta aftur til heimlandið, heldur tilboðið um bráðfeingis bústaðir uppat.

Nevnast skal harafturat, at lógaruppskotið leggur upp til, at løgtingslógin skal fara úr gildi aftur tann 1. januar 2028, og at bráðfeingis bústaðir ikki verða veittir eftir hetta, uttan so at gildistíðin hjá løgtingslógini verður longd.

Tilboð um bráðfeingis bústað er harafturat altíð treytað av, at Landsverk hevur onkur hølir og sostatt hevur ein bústað at bjóða.

Ásetingin ger harafturat greitt, at bráðfeingis bústaðirnir eru *felags bústaðir*. Talan er tí ikki um vanligar leigubústaðir við sjálvstøðugum íbúðareindum. Bráðfeingis bústaðirnir eru ístaðin skipaðir sum eitt slag av búfelagsskapum, har persónar og familjur, í tann mun tað ber til, fáa eitt ella fleiri kømur í part, men har tey mugu deila, køk, ves og baðirúm og onnur felagshølir saman við øðrum persónum í bráðfeingis bústaðnum.

Uppskotið til § 2 ger harafturat greitt, at bráðfeingis bústaðirnir bara eru ætlaðir til persónar, sum koma undir § 1, t.e. burturriknir ukrainar við fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum.

Ásetingin í § 2 ger at enda greitt, at bráðfeingis bústaðirnir bara eru til persónar, sum ikki hava annan *hóskandi bústað*.

Um ein persónur ella familja ikki hava nakran bústað, koma tey sjálvandi undir ásetingina. Sama er galdandi, um persónurin ella familjan innan heilt stutta tíð verður uttan ein bústað.

Hevur persónurin ella familjan ein bústað, men bústaðurin ikki er hóskandi í mun til tørvin hjá familjuni, eitt nú tí hann er so lítil ella í so vánaligum standi, koma tey somuleiðis undir ásetingina.

Ein persónur ella familja, sum hevur ein bústað, men ikki ynskir at búgva í bústaðnum longur, tí tey halda hann vera ov dýran, kann ikki uppsiga leigumálið fyri ístaðin at flyta inn í ein bráðfeingis bústað.

Er bústaðurin so dýrur, at persónurin ella familjan ikki hevur ráð at búgva í honum, er støðan sjálvsagt ein onnur, sbr. eisini § 8 um ávísing í bráðfeingis bústaðir og serligu viðmerkingarnar til hesa grein.

**Til § 3**
Uppskotið til *§ 3, 1. pkt.* er ein heimild til Landsverk at útvega bygningar og hølir at nýta sum bráðfeingis bústaðir til burturriknar ukrainar.

Heimildin til Landsverk er við vilja orðað rættiliga breitt. Víst verður tó til skilmarkingina av hugtakinum, *bráðfeingis bústaðir*, omanfyri undir serligu viðmerkingunum til § 2, sum ger greitt, at bráðfeingis bústaðir eru felags bústaðir, ikki sjálvstøðugar bústaðareindir, har persónar ella familjur, í tann mun tað ber til, fáa eitt ella fleiri kømur í part, men har tey mugu deila køk, ves og baðirúm og onnur felagshølir saman við øðrum persónum í bráðfeingis bústøðunum.

Hetta leggur sjálvandi upp til, at heimildin skal nýtast til at útvega stórar bygningar og hølir, har nógv fólk kunnu búgva saman.

Landsverk kann nýta heimildina til at leiga bygningar til endamálið, og í løtuni leigar Landsverk partar av gamla Barnaheiminum í Pedda við Stein Gøtu í Havn.

Heimildin kann tó eisini nýtast til at leiga bygningar og hølir hjá landinum út sum bráðfeingis bústaðir. Landsverk kann eisini útvega bygningar og hølir á annan hátt, men heimildin er ikki ætlað til at keypa nýggjar ognir til endamálið.

Við uppskotinum til *§ 3, 2. pkt.* fær Landsverk harafturat heimild at *seta í stand, umbyggja og halda við líka* bústaðirnar, eins og Landsverk fær heimild at útvega mest grundleggjandi innbúgvið (sengur, køksamboð o.tíl.) til bústaðirnar.

Endamálið við heimildini til Landsverk er at tryggja, at burturriknu ukrainarnir altíð hava eitt stað at búgva, so leingi teir eru í Føroyum.

**Til § 4**
Uppskotið til *§ 4, stk. 1* ger greitt, at Landsverk er útleigari og umsitur bráðfeingis bústaðirnar.

At Landsverk er *útleigari* hevur m.a. tann týdning, at leigusáttmálin hjá teimum búgvandi skal gerast við Landsverk.

At Landsverk *umsitur* bústaðirnar merkir m.a., at Landverk hevur ábyrgdina av at viðlíkahalda bústaðirnar og veita vanligar húsavarðartænastur í bústøðunum og krevja húsaleiguna inn.

Sum útleigari fer Landsverk at hava ein húsavørð lutvíst tøkan til bústaðirnar, sum dagliga/vikuliga fer at hava umsjón við bústøðunum.

§ 4, stk. 1 vísir til §§ 8-9 í uppskotinum. Hetta er fyri at gera greitt, at hóast Landsverk er útleigari, er tað Almannaverkið, ið sambært § 8 fer at standa fyri at ávísa persónar í bráðfeingis bústaðirnar. Harafturat verður tað Almannaverkið, ið fer at kunna krevja, at ein persónur skal flyta í ein annan bráðfeingis bústað (§ 9, stk. 1), ella at ein persónur skal taka av einum tilboði um hóskandi bústað (§ 9, stk. 2).

Hóast Landsverk verður útleigari, verður tað sostatt Almannaverkið, ið fer at gera av, hvør ið kann flyta inn í bráðfeingis bústaðirnar, og nær persónarnir skulu flyta í annan bráðfeingis bústað ella flyta út.

Uppskotið til *§ 4, stk. 2* heimilar landsstýrisfólkinum í samferðslumálum at gera eitt standard leiguskjal fyri leigumálini í bráðfeingis bústøðunum og at áseta skilhaldsreglur fyri bústaðirnar.

**Til § 5**
Uppskotið til *§ 5, stk. 1* ásetur, at leigulógin ikki verður galdandi fyri bráðfeingis bústaðirnar.

Leigulógin letur í § 1, stk. 4 upp fyri hesum møguleikanum. Avgerðin um at undantaka bráðfeingis bústaðirnar frá leigulógini er grundað á, at bústaðirnir sum heild ikki egna seg at koma undir reglurnar í leigulógini, tí talan er ikki um vanligar leigubústaðir, men um eitt bráðfeingis tilboð.

Fyri at fáa skipanina við bráðfeingis bústøðum at virka er tað eitt nú neyðugt, at tað stendur Landsverki og Almannaverkinum frítt at flyta fólk úr einum bráðfeingis bústaði í ein annan, um hetta er neyðugt fyri at fáa samansetingina av persónum at ganga upp.

Tað kann t.d. vera neyðugt at flyta ein persón frá einari adressu til eina aðra adressu, ella úr einum stórum kamari í eitt minni kamar, soleiðis at tað verður pláss hjá einari familju at búgva samlað.

Persónar í bráðfeingis bústøðum fara tí ikki at hava somu rættindi sum persónar, sum búgva í vanligum leigumálum, ið er fevnd av leigulógini, men talan er sum nevnt ikki um vanlig leigumál.

Av tí, at bráðfeingis bústaðirnir ikki verða fevndir av leigulógini, leggur *§ 5, stk. 2* upp til, at landsstýrisfólkið í samferðslumálum skal kunna áseta serstakar leigureglur fyri bústaðirnar. Verða ongar serstakar leigureglur ásettar, eru leigumálini fevnd av vanligum obligatiónsrættarligum reglum.

**Til § 6**
Uppskotið til *§ 6, stk. 1* staðfestir yvirskipað, at persónar í bráðfeingis bústøðum skulu rinda landinum fyri húsaleigu

Landsverk útvegar, rindar fyri og umsitur bráðfeingis bústaðirnar. Tí er tað eisini Landsverk, ið fer at krevja húsaleiguna inn.

Uppskotið til *§ 6, stk. 2* heimilar Landsverki at áseta húsaleiguna í samráð við landsstýrisfólkið í samferðslumálum.

Húsaleigan hevur higartil verið ásett eftir inntøkuni og familjustøðuni hjá persóninum, og soleiðis fer tað eisini at vera frameftir.

Sum dømi kann nevnast, at ein persónur undir 25, ið býr saman við foreldrunum, í dag rindar 500 kr. í húsaleigu; ein stakur persónur yvir 25, sum býr einsamallur, rindar 2.750 kr. í húsaleigu; ein vaksin persónur við einum barni rindar 3.600 kr. í húsaleigu; eitt par við einum barni rindar 5.100 kr. í húsaleigu.

Uppskotið til *§ 6, stk. 3* heimilar landsstýrisfólkinum í samferðslumálum at áseta reglur um innkrevjing av húsaleiguni.

**Til § 7**
Uppskotið til *§ 7* staðfestir, at samlaðu inntøkurnar frá húsaleiguni sambært § 6 kunnu vera lægri enn samlaðu útreiðslurnar hjá landinum at útvega, umsita og reka bráðfeingis bústaðirnar.

Almennu Føroyar hava tikið á seg ábyrgdina av at taka ímóti burturriknu ukrainunum. At veita persónunum tak yvir høvdið er kanska mest grundleggjandi partur av hesi uppgávu. Útboðið av hóskandi bygningum og hølum til endamálið er avmarkað, og tískil má landið taka á seg møguligan fíggjarligan váða, um leiguinntøkurnar ikki svara til útreiðslurnar hjá landinum í hesum sambandi.

**Til § 8**
Uppskotið til *§ 8, stk. 1* staðfestir yvirskipað, at tað er Almannaverkið, sum ávísir persónar í bráðfeingis bústaðirnar. Hóast Landsverk er útleigari og umsitur bústaðirnar, er tað sostatt Almannaverkið, ið tekur avgerð um, hvør ið kann flyta inn.

Ávísingin hjá Almannaverkinum skal taka støði í eini ítøkiligari tørvsmeting, men tað er ein treyt, at persónurin ella familjan er uttan bústað, innan stutta tíð verður uttan bústað, ella at persónurin ella familjan býr í einum bústaði, sum ikki hóskar til teirra tørv, sbr. í hesum sambandi uppskotið til § 2 og serligu viðmerkingarnar til greinina.

Hevur persónurin ella familjan longu ein bústað, men persónurin ella familjan ikki hevur ráð til bústaðin, er bústaðurin ikki hóskandi.

Er talan um eina familju við 3 børnum, men íbúðin bara hevur 1 kamar, er bústaðurin sum meginregla heldur ikki hóskandi í mun til tørvin.

Aðrar umstøður kunnu eisini gera bústaðin óhóskandi, t.d. at bústaðurin er í sera vánaligum standi.

Um leigusáttmálin er stuttur, ella sáttmálin skjótt gongur út, verður persónurin ella familjan skjótt uttan ein bústað. Almannaverkið kann tá eisini ávísa persónin ella familjuna í ein bráðfeingis bústað.

Við uppskotinum til *§ 8, stk. 2.* fær landsstýrisfólkið í almannamálum møguleika at áseta nærri reglur um treytirnar fyri ávísing.

**Til § 9**

Uppskotið til *§ 9, stk. 1* ger greitt, at ein persónur í bráðfeingis bústaði hevur skyldu at flyta í ein annan bráðfeingis bústað, um Almannaverkið krevur tað.

Orsøkin til ásetingina er, at tað ikki skal vera nakar ivi um møguleikan hjá Almannaverkinum at flyta persónar úr einum bráðfeingis bústaði í ein annan, um tað t.d. er neyðugt fyri at fáa samansetingina av persónum at ganga upp.

Tað er eisini møguligt, at eftirspurningurin eftir bráðfeingis bústøðum fer at lækka. Almannaverkið og Landsverk mugu tá hava møguleika at finna aðrar bygningar ella hølir, sum rúma færri fólkum, og sum harvið kunnu hava ein lægri leigukostnað fyri Landsverk.

Talan kann eisini vera um at flyta ein persón frá einari adressu til eina aðra adressu, ella frá einum størri kamari til eitt minni kamar, soleiðis at tað verður pláss hjá einari familju at búgva samlað á fyrrnevndu adressu ella kamari.

Uppskotið til *§ 9, stk. 2, 1. pkt.* leggur harafturat upp til, at Almannaverkið skal kunna áleggja einum persóni at taka av einum tilboði um annan hóskandi bústað.

Ásetingin hongur saman við uppskotinum til § 2, ið ger greitt, at bráðfeingis bústaðir bara eru ætlaðir sum fyribils, felags bústaðir til persónar, sum ongan annan bústað, ella ongan hóskandi bústað, hava.

Við uppskotinum til *§ 9, stk. 2, 2. pkt.* skal Landsverk tí, eftir áheitan frá Almannaverkinum, siga leigumálið í bráðfeingis bústaðnum upp, um ein persónur ikki tekur av einum tilboði um annan hóskandi bústað.

Bústaðurin skal hóska til tørvin hjá persóninum ella familjuni. Er talan um eina familju við fýra persónum, skal bústaðurin vera hóskandi til fýra persónar.

Persónur ella familja kann ikki nokta at taka av einum tilboði um hóskandi bústað, tí bústaðurin er dýrari enn bráðfeingis bústaðurin. Avgerandi er, at persónurin ella familjan hevur ráð at rinda húsaleiguna og hevur nóg mikið eftir at liva fyri. Hava tey tað, hava tey skyldu at taka av tilboðnum.

Fyri at bústaðurin kann sigast at vera hóskandi, er tað harafturat ein treyt, at persónurin ella familjan kann rokna við at verða búgvandi í eitt longri tíðarskeið. Tað má metast ítøkiliga um hetta í einstaka førinum, men er tíðarskeiðið styttri enn 3 mánaðir, er bústaðurin sum meginregla ikki at meta sum hóskandi.

Endamálið við § 9, stk. 2 er at undirstrika, at bráðfeingis bústaðir bara eru ætlaðir sum fyribils bústaðir. Ásetingin er eitt amboð at fremja hetta.

**Til § 10**
Uppskotið til *§ 10, 1. pkt.* ásetur, at Almannaverkið hevur ábyrgdina av at hava ein sosialan samskipara í bráðfeingis bústøðunum, og at Almannaverkið kann seta starvsfólk at røkja uppgávuna.

Ístaðin fyri at seta ein sosialan samskipara, kann Almannaverkið sambært § 10, *2. pkt.* gera avtalu við ein uttanhýsis part um at røkja uppgávuna sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum.

Starvsuppgávan hjá sosiala samskiparanum er sambært § 10, *3. pkt.* at veita teimum búgvandi sosialfakliga ráðgeving, hjálp og stuðul.

Sosiali samskiparin skal m.a. hjálpa við samskiftinum millum tey búgvandi (sum kunnu vera sera ymisk og vera í sera ymiskum lívsstøðum), skipa fyri húsfundum, hjálpa við praktiskum uppgávum, samskipa reingerð av felagshølum og fylgja hesum upp, greiða teimum búgvandi frá skilhaldsreglunum, og um neyðugt minna á skilhaldsreglurnar.

**Til § 11**
Uppskotið til *§ 11* er ein heimild til landsstýrisfólkið í almannamálum at víkja frá ymiskum treytum – og í nærri tilskilaðan mun áseta serreglur – á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar við fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum, sbr. í hesum sambandi uppskotið til § 1 og serligu viðmerkingarnar til greinina.

Við uppskotinum til *§ 11, nr. 1* fær landsstýrisfólkið heimild at víkja frá treytini um danskan heimarætt sambært § 3. stk. 2, nr. 1 í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., so burturriknu ukrainarnir kunnu fáa barnagjald á jøvnum føti við føroyingar.

Landsstýrisfólkið fær við uppskotinum til *§ 11, nr. 2* eisini heimild til – í nærri tilskilaðan mun – at víkja frá treytini um varandi uppihaldsloyvi sambært § 2, stk. 2 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk fyri kapitlar 3, 4 og 8 í løgtingslógini, so Almannaverkið kann arbeiða meira aktivt við at fáa burturriknu ukrainarnar út á føroyska arbeiðsmarknaðin, og at varðveita teir á arbeiðsmarknaðinum.

Harafturat fær landsstýrisfólkið við uppskotinum til *§ 11, nr. 3* heimild at víkja frá § 12, stk. 1 í almannalógini um, at burturriknir ukrainar, ið eru sambúgvandi, automatiskt fáa eina lægri uppihaldsveiting enn persónar, sum búgva einsamallir, eins og landsstýrisfólkið fær heimild at seta serligar treytir fyri uppihaldsveiting til burturriknar ukrainar.

Hetta síðsta er fyrst og fremst ætlað til at kunna seta sum treyt fyri uppihaldsveitingini, at ukrainarnir læra seg so mikið av føroyskum ella enskum, at teir verða førir fyri at virka á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Heimildirnar í § 11, nr. 1-3 eru avmarkaðar til tær ásetingar og fyriskipanir, sum eru beinleiðis nevndar í lógartekstinum.

Viðvíkjandi ásetingini í § 11, nr. 3 fær landsstýrisfólkið sostatt bara heimild til at víkja frá kravinum um varandi uppihaldsloyvi fyri kapitlar 3, 4 og 8 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, ið snúgva seg um virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinaraskipan – og ikki fyri eitt nú kapittul 6 um tillagað starv.

Landsstýrisfólkið fær við uppskotinum ikki heimild at áseta *serreglur* um virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinaraskipan, sum víkja frá vanligu reglunum í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, men kann velja bara at seta partar av einum kapitli í gildi fyri burturriknu ukrainarnar heldur enn at seta ein heilan kapittul í gildi. Landsstýrisfólkið kann sostatt velja millum at seta t.d. allan kapittul 4 um arbeiðsbúgving í gildi fyri burturriknu ukrainarnar, ella bara partar av hesum kapitli.

Yvirskipaða endamálið við uppskotinum til § 11 er at tryggja, at burturriknu ukrainarnir hava nóg góðan møguleika at fóta sær, meðan teir eru í Føroyum.

Løgtingslógin verður tíðaravmarkað og er sett at fara úr gildi aftur við sólseturáseting tann 1. januar 2028, sbr. serligu viðmerkingarnar til § 13 niðanfyri. Tá løgtingslógin fer úr gildi, fara reglurnar, sum verða ásettar við heimild í § 11, eisini úr gildi.

**Til § 12**
Uppskotið til *§ 12* heimilar Almannaverkinum at halda serligar útreiðslur, ið eru tongdar at uppgávuni, ið landið hevur átikið sær við burturriknu ukrainunum.

Talan er um útreiðslur, ið fella uttanfyri galdandi lóggávu, og sum í flestu førum ikki eru at meta sum veitingar til einstaklingar.

Sum dømi kann nevnast, at ein av burturriknu ukrainunum doyði í Føroyum. Ein deyður persónur kann ikki søkja um fíggjarligt ískoyti til jarðarferð ella til at verða sendur heim aftur til Ukraina, og at flyta lík til Ukraina er kostnaðarmikið. Í tílíkum førum er tað skynsamt, at Almannaverkið t.d. kann rinda fyri líkbrenning í Danmark, fáa urnuna flutta til ukrainsku sendistovuna í Danmark, sum síðani kann taka sær av at fáa urnuna heim til Ukraina.

**Til § 13**
*§ 13* er gildiskomu- og gildistíðaráseting. Greinin ásetur, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og at hon fer úr gildi aftur tann 1. januar 2028.

Løgtingslógin fer sostatt úr gildi aftur við sólseturáseting.

Tá løgtingslógin fer úr gildi, fara allar kunngerðir, sum eru lýstar við heimild í løgtingslógini, eisini úr gildi.

Landsverk fer tá ikki longur at hava heimild at veita burturriknu ukrainunum bráðfeingis bústaðir, og møgulig undantøk og serreglur á almannaøkinum fyri ukrainarnar fara ikki longur at vera galdandi.

Fyribils uppihaldsloyvini hjá burturriknu ukrainunum fara úr gildi tann 17. mars 2027, um tey ikki verða longd áðrenn hetta.

Verða uppihaldsloyvini hjá burturriknu ukrainunum longd áðrenn 17. mars 2027, soleiðis at tey eisini verða galdandi eftir 1. januar 2028, má gildistíðin á hesi løgtingslóg longjast, um ukrainarnir skulu varðveita tey rættindi, sum løgtingslógin gevur teimum.

Almanna- og heilsumálaráðið, 18. februar 2026

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Reyða Krossi
Fylgiskjal 3: Ummæli frá stýrinum fyri Føroya Barnaheim
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Útlendingastovuni
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Landsverki
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Kommunufelagnum